SOSIALURIN

Nr. 10 — 4. FEBRUAR 1967 — 40. ÁRG.

Vápnagný

TAÐ ER IKKI SØRT, AT TEIR GOMLU SAM GONGUMENNINIR ERU FARNIR AT GERA UM SEG, NÚ SAMGONGUTEYMARNIR ERU SLITNAÐIR OG HVØR Í SÍNUM LAGI LÆTTARI KANN GERA VART VIÐ FYRIBRIGDI. IÐ BERT HESIR VISTU ALLAN SANNLEIKAN UM AT SIGA. NÚ VERÐUR IKKI SPART VIÐ HVØSSUM ORÐUM

Tað var ikki sørt fólk vistu um hitt farna landsstýri. At har var mikið klandur var best prógvað, tá ið Hákun Djurhuus, gamli løgmaður, helt einastu ráðini vera at kvetta, fyrst og fremst við tjóðveldismenn, sum vóru ringir at fáast við. Sambands tráðurin mikli — sjálvstýris tráðurin — ið binda skuldi saman hinar skurvutu »sjálvstýrisflokkarnar« var ikki sterkari enn so, at neyðugt var við ymiskum vesælligum knútum, um ikki alt skuldi fara heilt um koll.

Hitt veikasta liðið í samgonguni var tjóðveldið, sum tó sjálvt var so veikt, at tað ikki tordi taka avleiðingarnar, tá ið Hákun Djurhuus tveitti teir fyri borð.

Afturhaldssinnið og bangilsi tjóðveldisins fyri einum komandi vali var so stórt, at tað heldur enn at standa andlit til andlit mótvegis veljarunum, aftur kreyp undir kotavel Hákun Djurhuusar. Ikki tí, at nevna hetta sum nakað eindømi, er lítið vert, tí veruliga hoyrir hesin flokkur heima í skugganum av fólkaflokkinum, haðani ein fjøld av tjóðveldismanningini er komin.

skúlin

Grein SJEY

Eitt hitt mesta klandursmál, ið verið hevur í føroyskum skúlaskapi var grein 7 í skúlalógini, sum segði, at danskt skuldi vera undirvísingarmál í skúlunum.

TÁ ið JAVNAÐARFLOKKURIN var komin á ting og ikki meira lovaði sjálvstýrisflokkinum at sita hendur í favt, tá tað galt hitt nationala og tá fyrst móðurmálsins rætt í skúlunum, var sjálvandi hin vitleysa grein 7 í skúlalógini havd væl í huga. Hon mátti burtur, og skuldi burtur; hetta var mið og mál javnaðarflokksins, met tað skuldi kortini ikki ganga so lætt, sum tað var nattúrligt. — Tíverri varð málið á mangan hátt brúkt til politiskt kost og politiska øsing, men kortini eydtaðist tað at gera donsku javnaðarstjórnini vart við, at her mátti nakað henda.

Tá eydnaðist javnaðarflokkinum við dyggari troðkan á donsku rikisstjórnina at fáa hana at ganga við til at strika grein 7 og harvið var øsingarmálið um danskt sum undirvísingarmál beint av vegnum!

hugskot

SKATTURIN


Tað er ikki beinleiðis stuttligt at tala um skatt, nei, minni enn so; men nú hava so øll latið sjálvuppgávuna inn, og skattaprátið hevur sum vanligt verið nógv, verður at halda fram, hagar til úrslitini fara at koma reiðaliga fram.

Í árinum, sum fór, kærdu fólk seg um, at inntøkan var ov lítil — tað gekst illa at fáa endarnar at røkka saman; men nú fólk sótu við sjálvuppgávuni, gramdi mangur seg um, at inntøkan seinasta ár var nógv ov stór.

Hvør ger sær ikki hin heiðurligasta ómak at draga so nógv frá sum gjørligt — ja, onkur kanska í meira lagi.

* Mangur pápin, sum á hvørjum
* ári leggur høvdið í blot og ger
* sær allan ómak at minka um
* sjálvuppgávuna, verður í oðini,
* um sonurin tekur eitt 10-oyra
* — ja, sjálvt um hann tekur tað
* frá einum øðrum, men á sjálv-
* uppgávuni aftrar hann seg ikki
* við sjálvur at blaka burtur
* krónur í rúgvuvís.

– KROSSORÐ –



Yvir: 1) frukt 6) far 12) róðraamboð 14) tal 15) akfar 26) gjald 18) smiða 19) ljós 21) líkamslutir 23) luft 25) jarðamál 26) gamal trolari 29) talending 30) spreingiknøttur 31) bróðurmordari 33) byrðan 34) svør.

Niður: 1) sleingir 2) fuglur 3) barn 4) soltin 5) frá 7) segl 8) slekt 9) hannurin 10) matur 11) kustur 13) skyldkonan 16) gomul vekt 17) vørumerki 20) pengar 21) mansnavn 22) jaga 24) alheimsstovnur 27) kantur 28) stuldur 30) tóni 32) kem. tekn.



— Ein er langt niðri, tá ein skrivar sjálvuppgávuna, men ein vil fegin longur niður!

* * *

Per: Eg hoyrdi son tín á fundinum í gjárkvøldið. Hann er óføroyr røðari.

Pól: Ja, og tey siga, at tað hevur hann eftir mær.

Per: Hann ralaði í heilar 2 tímar.

Pól: Ja, og tað hevur hann eftir mammu síni.

* * *

Tað eru fólk, sum ikki fáa seg at snýta í skatt. Tey biðja onnur skriva sær sjálvuppgávuna!

* * *

Fyrstu ferð:

Gamla Hanna, kona Per, drakk fyri fyrstu ferð í lívinum. Við fyrsta slurkin letur í henni:

— Merkiligt, hetta smakkar akkurat sum tað medisinið, maður mín hevur tikið nú í nógv ár.

* * *

DANIN: Hofsorg hava vit tibetur ikki havt síðan ølverkfallið!

HON skrivar

TÁ BLÆURNAR GERAST GRÁAR OG GULAR

Tað, vit her skulu umrøða geldur ikki bara blæur, men eisini øll onnur hvít bummullsstoff, sum við tíðini gerast grá og gul. Eitt meira gjøllla umfarið vask ger toyið aftur fint, hvítt og lætt.

Bestu evni eru eddikasýra og sitrónsýra; tó má eddikasýra ikki brúkast í galvaniseraðum ílotum, tá tílík ílot fara illa av sýruni. Sitrónsýran er hin dýrara; men hon tekur lættari burtur kálk og jarnevni, sum gera toyið gult.

* Sýrurnar verða báðar brúktar
* á sama hátt. Brúkað ½ l av
* eddikasýru (32 pst.) ella 100 g
* av sitrónsýru til 10 l av vatni.
* Toyið skal liggja í vatninum
* ½ tíma, verður vundið og lagt
* í eitt nýtt, heitt vatn við sodu
* (1 3 dl soda til 10 l av vatni).
* Skúmar soda-vatnið nógv, er
* best at fáa srr nýtt vatn og
* royna einaferð enn. Tá toyið
* nú fær eitt vanligt vask í heit-
* um vatni og verður vaskað við
* sjálvvirkandi vaskievni (syntet-
* isk evni — sulfo — duga ikki)
* hevur ein hitt rætta úrslitið
* toyið er sum nýtt á at líta.

* * *

GÓÐ RÁÐ



Gullskógvar

Gull- og silvur skógvar eins og toy við innvovnum metaltráðum eiga at verða varveitt innpakkað í svart silvurpappír. Hetta forðar, at teir gerast svartir!

KIKKARIN

MANGT SKAL EIN HOYRA

At mikið orðavavstur skuldi koma omaná hina sokallaðu »sjálvstýrissamgongunа« var altíð væntandi. Vit seta kikarin á »14. sept.« og lesa:

»Tað kann eisini sigast, at tað hevur verið hetta, ið hevur hildið flokkin (sjálvstýrisflokkin blaðstj. **anandi. Tað er ódemokratiskt og í strið við alla fólkaræðisliga somd, at ein flokkur við so fáum veljarum aftan fyri seg skal hava avgerðarorð í landsins stýri«.**

— — —

Hvat siga menn um »hulu hondina«?

M NÝGGI SMYRIL
O Dam slapp ei at vera við,
L tá doyptur var Smyril nýggi,
A sum Dammur sigur Kj. Mohr
R ov stuttan gjørdi føtur tiggju!

* var tað einki at siga til, um
* fólkaflokkurin vann valið mill
* um sjálvstýrisflokkarnir, tí all-
* ir uttan fólkaflokksmenn søgdu
* at sama gjørdi, hvønn fólk
* valdu, bara tað var ein av
* sjálvstýrisflokkunum — og so
* valdu fólk fólkaflokkin!

blaðmenn nóg so nógv av, og tá kanska eina mest í politiskum tjaki. Nú skilji eg, at SOSIALURIN hóast alt hevur verið eitt, ja, má eg hava loyvi at siga; eitt barnablað í sínum avmyndingum av hinum her í blaðnum so ofta nevnda sokallaða »sjálvstýrislandsstýrinum«.

Eg má spyrja: hevur tað virkiliga verið so galið, sum Marius Johannesen sigur?

Greiðir maðurin rætt frá, so má eg spyrja: eiga hesir menn, ið rátt hava í fýra ár, neista av ábyrgdarkenslu í sær.

Tá ið menn til fulnar hava ásann að, at tað ikki var høpi í tí samgongu, sum teir høvdu fingið í lag, var tað tá ikki teirra skylda at leggja frá sær og geva fólkinum høvi til at velja menn, ið meira álit var til?

Fiskimaður.

VÆL SAGT:

Moskva sigur, at hin reyði tráðurin í allari kommunismu ikki er kinesiskur tráður!

Eingin týmir at bukka seg niður eftir einum 1-oyra; men øll mugu boyggja seg fyri pengunum!

Bæði Kina og Sovjet verja kommunismuna — móti hvørjum øðrum!

5 spurningar

1. Hvussu stórt er Ísland?
2. Hvør er danskur uttanríkisráðharri?
3. Hvør er 6. størsta oyggj í Føroyum?
4. Hvør var løgmaður í 1953?
5. Hvussu heit er sólin uttan?

SVAR: 1) 103.000 kv.km. 2) Jens O. Kragh. 3) Borðoy 4) Kr. Djurhuus 5) 6000 hitastig.

Veitst tú

AT heimsins elsta hjúnarbandslýsing stóð í »Manchester Weekly« í 1727. Lýsarin var ein kvinna. Lýsingin vakti mikla øsing millum manna, at kvinnan at at enda varð løgd inn á eitt sinnissjúkrahús til »kanningar av hennara sinnisstøðu«.

AT USA er statistiksins heimland. Nú verður sagt frá, at 29 pst. av 29 pst. av allari frigging fer fram, meðan tey ungu eru biltúrar.

AT serfrøðingar vilja vera við, at ikki minni enn 27.000 miljónir tons av olju liggja til reiðar at pumpa upp úr havbotninum.

AT terningaspæl var nógv útbreitt í Indiu í fornøldini. Ja, í Indiu høvdu teir fastar eftirlitsmenn við terningaspæli.

AT sambrrt ensk hagtøl doyr har í landinum eitt barn fimta hvønn dag orsakað av brunaskaða.

AT í USA eru 146 sløg av slangum, færri enn 20 av teimum eru giftigar.

AT tað bara eru hon-elefantar, sum verða tamdir til sirkusbrúk.

AT tað eru 13 almenn mál í Sovjetsamveldinum.

BØRNINN

OYGGJ. Set bókstavarnar niðanfyri annarleiðis saman, og tú fært navnið á stórari oyggj:

GDRKSMAAAA

KLOKKUGÁTAN



1— 2 = drykkur
1— 5 = fugli
5— 6 = land
7—10 = nem
8—12 = korn


FIMMARIN:



1 = oyggj og djór
2 = mannsnavn
3 = hin
4 = ljóðið
5 = veltur


LOYNDARORÐ

Tá tú hevur funnið orðini niðurefti, fært tú á 2. og 4. reglu niður eftir nøvnini á tveimum londum:



1) illkvendi 2) fuglar 3) lítið djór (øvugt) 4) vognur 5) mamma (grønl.) 6) fýrurin 7) djórið.

BROV



FANTASTISKT!

Umborð á Smirli sá eg Tingakross og setti meg at lesa blaðið — og eg noyddist lesa blaðið við tí, sum ofta verður tikið til millum manna »andakt«.

Eg skuldseti ikki SOSIALIN fyri at illgita; men eg kann ikki avsanna ta hugsan, at við hvørt gera